Neistin-Stjørnan 17-26(10-14):

# Lætt hjá oddaliðnum

**Uppgávan hjá Stjørnuni móti Neistanum í Havn sunnudagin gjørdist lættari enn væntað, og tað var skjótt, at spenningurin fór úr dystinum**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tá avtornaði megnaði Neistin ikki at gera nakað stórvegis við oddaliðið úr Klaksvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nógv høvdu væntað ein spennandi dyst og eina harða avbjóðing fyri oddaliðið Stjørnuna, tá ið tær sunnudagin vóru á Hálsi og dystaðust við triðfremsta liðið í kvinnudeildini Neistan. Men dysturin gjørdist ongantíð so spennandi, sum fleiri kanska høvdu væntað, tí Stjørnan var snøgt sagt væl betri enn Neistin.

### Skjótt álopsspæl

Í fyrra hálvleiki av dystinum megnaði Neistin so dánt at fylgja við Stjørnuni, men so hvørt sum hálvleikurin leið, øktist munurin millum liðini, so at Stjørnan var fýra mál framman fyri í steðginum. Hendan leiðsla øktist skjótt beint eftir steðgin, tá ið Stjørnan gjørdi ein vørr, og tá ið seinni hálvleikur var hálvrunnin, høvdu gestirnir úr Klaksvík lagt seg á odda við átta málum.

Tað var serliga tað kvika álopsspælið hjá Stjørnuni, ið gav neistaverjuni trupulleikar, og tað kom fleiri ferðir fyri, at verjan hjá havnarliðnum ikki var komin upp á pláss, áðrenn bólturin lá í netinum. Eisini dugdu tær hjá Stjørnuni sera væl antin at bróta seg gjøgnum miðjuna á verjuni hjá heimaliðnum ella spæla strikuna leysa, og ofta sá tað ógvuliga lætt út hjá teimum. Harumframt hevur Stjørnan ein stóran styrk í mun til hini kvinnuliðið, tí at tær hava so mikið góða breidd, at tær kunnu skifta nógv út á liðnum, uttan at liðið viknar av tí sama.

Í hinum endanum gekk tað ógvuliga striltið hjá Neistanum at spæla seg ígjøgnum vælskipaðu verjuna hjá klaksvíkingum. Tá ið tað so hendingaferð eydnaðist, hevur Stjørnan í Agnes og Fríðu Petersen altso tveir av bestu kvinnuligu málverjunum í landinum, og tær høvdu fleiri góðar bjargingar sunnudagin.

### Oddabrak komandi sunnudag

Komandi sunnudagin skulu kvinnuliðini aftur í eldin, og tá verður oddabrak norðuri í Klaksvík, har Stjørnan fær vitjan av harðastu kappingarneytunum úr VB.

Hesi bæði liðini hava verið tey mest vinnandi í føroyskum kvinnuhondbólti seinnu árini, og tað skuldi verið løgið, um ikki annað teirra gerst føroyameistari í ár.

Neistin, sum sær út til at noyðast at taka til takkar við einum bronsuplássi í ár, fær vitjan av VÍF, og tað eigur at verða ein sigur til havnarliðið.

### Neistin-Stjørnan 17-26(10-14)

**Neistin:** Annika Thomsen 4, Simona Petersen 4, Marjun Tróndarson 4(2), Ása á Neystabø 3, Lív Sørensen 1, Kára á Dunga 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 5, Joan M. Djordjevic 5(2), Katarina Stjepanov 4, Annika Ljósstein 4(3), Bára S. Klakstein 3, Una Olsen 3, Anna Kristina Samson 2
**Brotskøst:** Neistin 3(2), Stjørnan 8(5)
**Útvísingar:** Neistin 4, Stjørnan 2
Dómarar: Brandur Johansen og Heri Petersen

# Talvið hesa vikuna

Kramnik,V (2754) - Topalov,V (2757)
Corus A Wijk aan Zee NED (2), 16.01.2005

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Rif6 5.Ric3 a6 6.Be3 e6 7.f3 b5 8.g4 h6 9.Fd2 b4 10.Ria4 Ribd7 11.0—0—0 (Skeivt er at leika:11.Ric6 Fc7 12.Rixb4 d5 13.exd5 Fa5, sum eigur at vinna fyri svartan) 11...Rie5! (Teoretiska nýggjheitin hjá Topalov! Kramnik fór í djúpar tankar og tók ímóti finnuoffrinum) 12.Fxb4 (12.b3 var ein møguleiki) 12...Bd7 13.Rib3? (Nú fær Topalov vinnandi fyrimun) 13...Rb8 14.Fa3 Rixf3 15.h3 Rixe4 (Finnu meir og betri støðu) 16.Be2 Rie5 17.Rhe1 Fc7 18.Bd4 Ric6! 19.Bc3 d5 20.Ribc5 Fa7! Og Kramnik endar við at missa enn fleiri finnur. T.d. 21.b4 Rixc4 og síðani Rixb4. Kramnik gavst tí 0—1



## Úrslit og støður

**1. deild - 7. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Klaksvík | Toftir | 4-0 |
| Heini Olsen | Andreas Andreasen | 1-0 |
| Ólavur Simonsen | Helgi Joensen | 1-0 |
| Finnbjørn Vang | Jústinus Hansen | 1-0 |
| Rani Nolsøe | Oddmar Andreasen | 1-0 |
| **Havnin** | **Hvalvík** | **3-1** |
| Martin Poulsen | Rógvi W. Rasmussen | 0,5-0,5 |
| Olaf Berg | Finnbjørn Zachariassen | 1-0 |
| Bogi Ziska | Martin Brekká | 0,5-0,5 |
| Helgi D. Ziska | Gunnar Joensen | 1-0 |
| **Vestmanna** | **Kollafjørður** | **1,5-2,5** |
| John Rødgaard | Hans Kr. Simonsen | 0,5-0,5 |
| Jákup á R. Andreasen | Torbjørn Thomsen | 0-1 |
| Samson Højgaard | Eyðálvur Johannesen | 1-0 |
| Mogens Nielsen | Bernhard Thomsen | 0-1 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 21,0 |
| 2. Havnin | 18,5 |
| 3. Hvalvík | 15,5 |
| 4. Kollafjørður | 12,0 |
| 5. Vestmanna | 12,0 |
| 6. Toftir | 4,0 |

# Klaksvíkingar økja um leiðsluna

**Oddaliðið úr Klaksvík gjørdu bart tá teir hittu botnliðið av Toftum í 7. umfari og havnarmenn vunnu somuleiðis góðan sigur á hvalvíkingum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eftir at havnarmenn vunnu greiðan 3-1 sigur á hvalvíkingum, tykist tað sum um, at teir eru teir einastu sum kunnu órógva oddaliðið úr Klaksvík.

Hvalvíkingar høvdu ein feskan 4-0 sigur í skjáttuni frá seinastu viku (móti kollfirðingum). Og teir fingu av øllum at døma eisini nakrar góðar støður á talvborðunum móti havnarmonnunum. Rógvi W. Rasmussen og Martin Brekká høvdu báðir ávísar møguleikar ímóti ávíkavist Martini Poulsen og Boga Ziska, men bæði talvini endaðu við javnleiki.

Uppgerðirnar á 2. og 4. borði vunnu havnarmenn. Olaf greiddi sína uppgávu móti tí annars støðugt vælleikandi Finnbjørn Zachariassen og Helgi D. Ziska vann sítt fyrsta talv í ár, ímóti Gunnari Joensen. Havnarmenn vunnu síni talv við hvítum og leikti javnt har teir høvdu svarta fólkið.

Klaksvíkingar, við Heina Olsen á 1. borði, vunnu ruddiliga 4-0 á toftamonnum. Finnbjørn Vang vann aftur, hesaferð á Jústines Hansen, og er nú saman við Olaf Berg, toppskorari í 1. deild við 6,5 stigum fyri sjey talv. Við sigrinum rógva klaksvíkingar aftur frá hinum liðunum. Bert trý umfør resta í.

Í Vestmanna vóru kollfirðingar á vitjan. John Rødgaard og Hans Kristian Simonsen leiktu javnt. Brøðurnir Torbjørn Thomsen og Bernhard Thomsen vunnu á ávíkavist Jákup á R. Andreasen og Mogens Nielsen. Samson Højgaard stóð fyri einasta pinninum vestmenningar fingu, tá hann vann á Eyðálvi Johannesen. Sostatt ein 2,5-1,5 sigur til kollfirðingar, sum nú hava eins nógv stig sum júst vestmenningar.

Í 2. deild eru klaksvíkingar eisini á odda. Og leiðslurnar teir hava í báðum deildunum er júst tann sama: hálvttriðja stig niður til næsta liðið! Klaksvíkingar vunnu toppdystin á sandavágsmonnum í vikuskiftinum og tykjast nú ikki at kunna steðgast.

### Sorl í Keypmannahavn

Føroysku útisetarnir fingu ikki nógv burturúr dystinum móti Brønshøj, sum vunnu heili 6,5-1,5 á okkara monnum. Eitt óvæntað skrædl. Einans John Arni Nilssen og Carl Eli N. Samuelsen ognaðu sær stig sunnudagin. John Arni vann eitt gott talv á IM Kim Pilgaard og Carl Eli leikti javnt móti IM Bjørn Brinck-Claussen.

Hinir seks á liðnum taptu allir tíverri. IM Nikolaj Borge telvaði væl móti GM Tiger Hillarp-Persson, men tapti finnuendatalvið. Flóvin bleiv spakuliga kroystur niður í sekkin móti vinmanninum Thorbjørn Bromann, meðan eykamaðurin á 8. borði Ian Leyni leikti sindur eitt óneyvt í miðspælinum og varð revsaður.

Heini Danielsen kærdi seg eftir talvið um idéleysa telving. Hann tapti uttan nakrantíð at fáa nakað mótspæl í gongd. Hinvegin høvdu Terji Petersen og Pól Martin Hansen góðar støður, sum teir av røttum ikki átti at hava tapt, men einki gekst til vildar hjá útisetum hesaferð í bestu donsku deildini.

Liðið hevur nú fimtan stig eftir fýra umfør og fór eftir skrædlið sunnudagin frá einum deildunum øðrum plássi niður á sætta pláss(!). Tó er eingin niðurflytingarvandi á ferð. Málið er enn topp fýra. Fimta umfar verður 6. februar og tá hitta føroyingar K 41. Sí annars støðuna aðrastaðni í blaðnum.

### Wijk aan Zee

Síðvanda Corus-kappingin í Wijk aan Zee fór leygardagin av bakkastokki. Allir í topp 10, undantikið Garry Kasparov, eru hjástaddir. Fjúrtan telvarar, trettan umfør. Eisini er ein B-bólkur og C-bólkur, sum báðir eru rættiliga vælmannaðir. Eitt nú luttaka Predrag Nikolic (2676) og Peter Heine Nielsen (2648) í B-bólkinum.

Tvey umfør eru leikt og einsamallur fremstur í A-bólkinum er Veselin Topalov, ið hevur fult stigatal. Hann hevur vunnið á Ruslan Ponomariov og Vladimir Kramnik. Einans tjúgu leikir við svarta fólkinum nýtti bulgarski topptelvarin fyri at koppa Kramnik!

Peter Leko vann eisini við svarta fólkinum sunnudagin. Hetta var ímóti favorittinum Viswanathan Anand. Millum luttakararnir eru Judit Polgar, Peter Svidler, Alexander Morozevich, Michael Adams, Judit Polgar og onnur fræg nøvn. Meira verður at frætta um kappingina í næstu viku.